## Lena, Maria Guttesen og Guðrið Hansdóttir á JobMatch

Í samband við JobMatch starvsstevnuna á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn 26. og 27. september, verður skipað fyri Netverkskvøldi í Føroyahúsinum fríggjakvøldið 26. september, við kjaki og tónleiki. Á Netverkskvøldinum í Føroyahúsinum fara tríggir føroyingar úr vinnu og fyriseting at greiða frá, hví grasið er grønari í Føroyum. Hetta skilt á tann hátt, at tey fara at bera fram sína áskoðan um fyrimunirnar við at virka og liva í Føroyum. Aftaná verður eisini politiskt kjak við føroysku fólkatingslimunum Edmund Joensen og Anitu á Fríðriksmørk um framtíðarsamfelagið Føroyar.Aftaná spæla: Lena Anderssen, Maria Guttesen & Guðrið Hansdóttir. Eisini verður eitt surprise navn á tónleikapallinum. Hesin er kendur fyri sínar útiseta sangir. Hetta verður kunngjørt beint undan JobMatch stevnuni. Meira fæst at vita á www.jobmatch.fo, tiltakið er ókeypis.

# Fimm minuttir ov langt burturi

**Soleiðis er støðan hjá íbúgvunum á Velbastað og í Kirkjubø, tá talan er um ókeypis busssambandið hjá Tórshavnar kommunu. Bussurin koyrir tríggjar ferðir um tíman út á Norðasta Horn, men bara seks túrar um dagin til Kirkjubøar, og enn færri til Velbastaðar**

BUSSSAMBAND
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




*Hóast tað bert eru fimm minuttir frá Norðasta Hornið til Velbastaðar og Kirkjubøar, hevur fólkið í bygdunum, ikki kent nakað til betraða busssambandi í Tórshavnar Kommunu*

Síðan 1. januar 2007 hevur bussleiðin hjá Tórshavnar kommunu koyrt ókeypis, og í eitt tíðarskeið hava bussarnir eisini koyrt oftari enn áðrenn. Men hetta er ikki nakað íbúgvarnir á Velbastað og í Kirkjubø merkja á nakran hátt. Kommunan skipar fyri bussum til og frá skúla, og hevur ein túr seinnapart, umframt ein túr á kvøldið, ið skal tilkallast.

Hetta eru íbúgvarnir á Velbstað og í Kirkjubø nú so ónøgdir við, at tey hava gingið húsagongd eftir undirskriftum at senda saman við skrivið til Tórshavnar kommunu við ynski um betrað busssamband. Fólkið í bygdunum tóku sera væl undir við hesum, og av teimum 256, sum búgva í bygdunum, skrivaðu heili 102 undir skrivið. Her má eisini havast í huga at tey 256 eru samlaða fólkatalið, og at tey 102 bert eru fólk við valrætti.

Í skrivinum stendur millum annað at búfólkið á Velbastað og í Kirkjubø hava somu skyldur sum fólkini í Havnini, men ikki kenna seg hava somu rættindi tá talan er um busssambandið. Tey ungu verða eisini nevnd, har áherðsla verður lagd á skerdu møguleikarnar hjá børnunum í samband við at vitja vinfólk og við at luttaka í frítíðarítrivum.

- Nógv fara enntá við bussinum út á norðasta horn og vóna at onkur tekur tey við. Men hetta ber sjálvandi ikki til tá mann skal til havnar, sigur Turið Kjølbro

### Óregluligt

Sambært skrivinum hjá bygdafólkunum í Kirkjubø og Velbastað er busssambandið ikki bara ov lítið, men eisini ov óregluligt. Hvønn dag, tá skúlarnir hava frí er ongin bussur, og ongin fær hetta at vita heldur. Harafturat koyrir bussurin øgiliga lítið í feriunum. Men í veruleikanum skilir bygdarfólkið ikki hví bussurin so sjáldan koyrir til bygdirnar, tí tað eru bert fimm minuttir til Kirkjubøar og Velbastað, frá Norðasta Hornið har bussurin koyrir tríggjar ferðir um tíman. Samstundis sum Kaldbak til dømis hevur nógv samband, hóast fólkini har eru nógv færri enn í bygdunum á vestursíðuni.

### Samband ávegis

Í trý ár hevur ein nevnd úr Kirkjubø og Velbastað arbeitt fyri at betra um hesi viðurskiftir, og onki er hent. Men tá Heðin Mortensen verður spurdur um málið er hann bjartskygdur, og sigur at betraða busssambandið er ávegis.

- Í fjør avgjørdu vit at bíða til fíggjarlógina fyri 2009 áðrenn vit skuldu seta hetta mál í verk. Í løtuni arbeiða vit við hesi, og eg ivist onga løtu í at tað verður tikið positivt upp, sigur borgarstjórin í Tórshavnar kommunu.

Hann leggur afturat, at kanska verður ein royndartíð gjørd áðrenn 1. januar 2009, men hann er í hvussu so er øgiliga positivur um málið, og metir tað vera rætt, um búfólkið í Kirkjubø og Velbastað fáa tað busssamband, sum tørvur er á.

- Eg vóni bara, at tey fara at nýta leiðina, sigur ein avgjørdur borgarstjóri.

# Ferðsluóhapp í Gassadali

**Í gjárkvøldið um hálvgum ellivu tíðina fór ein bilur av vegnum í Gassadali ávegis til Vestamanna. Bilurin gjørdist vrak, men bilførarin, ið var einsamallur í bilinum, er innlagdur, men hevur tað gott**

FERÐSLUÓHAPP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Varasýslumaður í Vágum, John Kruse, greiðir frá, at maðurin var á veg til Vestmanna tá hann misti tamarhaldið á bilinum og fór av vegnum í høgru síðu í Gassadali. Bilurin fór runt og endaði á takinum, so hann er vrak.

Sløkkiliðini í Kvívík og Vestmanna høvdu júst havt eina venjing og komu av tilvild fram á bilin. Eftir stuttari tíð høvdu teir funnið mannin, sum var farin úr bilinum og til fjals. Boð vóru send eftir hundi úr Havn, fyri at finna mannin, men tá hundurin kom fram, varð maðurin funnin.

Illgruni er um rúsdrekka í málinum, men hetta er ikki váttað enn, tí blóðroyndirnar, ið vóru tiknar, eru enn til kanningar.

Maðurin í bilinum fekk so mikið stórt mein, at hann var innlagdur á Landssjúkrahúsið, men hagani vilja tey ikki siga annað, enn at maðurin hevur tað gott.

Tá maðurin kemur út aftur av sjúkrahúsinum, kann hann vænta at hoyra frá løgregluni.



*Sløkkiliðini í Kvívík og Vestmanna høvdu júst havt eina venjing og komu av tilvild fram á bilin, og eftir stuttari tíð høvdu teir funnið mannin, sum var farin úr bilinum og til fjals*